# Kirkjukórið Ljómur og Vágs K

## Í dag, 19. februar 2009, kunnu Kirkjukórið Ljómur í Vági, og Vágs Kirkja halda sín sjeytiára dag. Í hesum sambandi er barna- og familjugudstænasta sunnudagin, har Ljómur fer at syngja



Ljómur allahalgannasunnudag, 2. nov 2008. Cindy v.L. Mensonides, kórleiðari, Anna Vestergaard, Karin Strøm, Herborg Niclasen, Jórun Pete
Sirið Stenberg, Ingibjørg Joensen, Karin Brattaberg, Solgerd Thomsen, Ulla Bærentsen, Susanne Brattaberg, Beinta Dam, Essan Mortensen og
Niels Nolsøe, Henry Koba, Per Lave, Kristian Holbæk, Henning Henriksen, Arnfinnur Thomassen, Magni Ejdesgaard, Sigmundur Olsen og La

MERKISDAGAR

Dagfinn Olsen
dagfinn@sosialurin.fo

Í slíkari blaðgrein, sum hesari, er vónleyst at skriva søguna um Ljóm og Vágs Kirkju úr enda í annan. Men tað er heldur ikki ætlanin. Heldur verður her stutt tikið samanum, nú Kirkjukórið Ljómur og Vágs Kirkja hava sjeyti ár á baki, og serliga verður dentur her lagdur á at greiða eitt sindur frá upprunanum til Ljóm, og sjeyti ára longu søguna hjá kórinum, ið her bert kann lýsast í smábrotum.

### Kirkjuvígsla við kórsangi

Í bóklinginum "Ljómur fimti", ið Niels Juel Nolsøe skrivaði, stendur at lesa, at kórsangur hevur verið í Vágs Kirkju, áðrenn Ljómur byrjaði. Hetta var í gomlu kirkjuni á Kirkjukletti, áðrenn Ljómur byrjaði í nýggju kirkjuni. Bang-Jensen var prestur í Vági frá 1931 til 1938, og frú Bang-Jensen savnaði fólk saman, og høvdu tey eitt kór, ið sang til høgtíðirnar. Prestahjúnini Bang-Jensen fóru aftur til Danmarkar í 1938, og var tað eitt nýtt kór undir nýggjari leiðslu, ið byrjaði í nýggju kirkjuni úti í Tippinum.

Í nótabók, sum Kirkjukórið Ljómur gav út í 1951, stendur í formælinum, at í 1939 tóku fólk í Vági seg saman, við Edith Dahl á odda, at stovna kirkjukórið "Ljómur".

Byrjanin til kórið var, at nakað undan kirkjuvígsluni tann 19. februar í 1939, tosaði kirkjuráðsformaðurin Johan Mortensen ráðsins vegna við Ellu Nolsøe, urguleikara við gomlu kirkjuna í 20 ár, um at fáa savna eitt kór.

Um hetta stendur í einum sangi, ið var yrktur til eitt ára haldið hjá kórinum:

*Tí Ella organist fór í býin*
*At savna saman til eitt kirkjukór*
*Fimm og tjúgu blivu vit í tal*
*Nú herum ein sangur ljóða skal*

Tey hittust fyrstuferð hjá Ellu Nolsøe 15. februar 1939 og sungu til vígsluna tann 19. februar. Í onkrari skrivligari keldu, sum liggur eftir Edith Dahl, roknar hon 15. februar at vera føðingardag kórsins, men hann hevur annars altíð verið hildin saman dag, sum kirkjan fyllir, nevnliga 19. februar.

Til fyrstu gudstænastuna í nýggju kirkjuni, ið varð vígd av Fuglesang-Damgaard, Sælands biskupi, har Jákup Dahl las inngangsbønina á føroyskum og Jógvan Waagstein, organistur, leikti pre- og postludium, sang kórið fleirræddaðu kórsvarini.

### Kórið mennist

Eftir vígsluna, varð hildið á við venjingum, og vant var nú til páskir. Kórið mennist og fólk legðist afturat.

Fyrsta venjingin fór, sum nevnt, fram heima hjá Ellu Nolsøe, men so tók Edith Dahl við. Á páskum í 1939 var fyrsta ferðin, at kórið útinti ta tænastu, sum síðani hevur verið fastur táttur av gudstænastuni í Vágs Kirkju, og sungu tey sálmar.

Fyrsta árið var virkið ár hjá Ljómi og sungu tey til fleiri høvi. Venjingin fór fram alt árið, og hildið var bert frí eina viku eftir hvørja høgtíð, og eina viku aftaná eina konsert.

Nevnast kann, at fyri stuttum vóru 100 ár síðni, at Edith Dahl var borin í heim, og mintist Ljómur dagin við at syngja sangir frá hennara tíð sum kórleiðari við eina guðstænatu í Vágs Kirkju.



Ljómur í Íslandi. Undir Snæfelsjøkli